# Stórfingin sølustevna

**Tíðindaskriv:** Ítróttarhøllin í Runavík verður í vikuskiftinum karmur um stórfingnu sølustevnuna Marko ´2000, sum Nes Sóknar Ítróttarfelag skipar fyri.

Ítróttarhøllin í Runavík verður á tremur við framsýnarum og vørum, tá sølusevnan Marko ´2000 letur upp fríggjadagin kl. 17.00. NSÍ hevur áður roynt seg sum fyrireikari og fyriskipari av slíkum sølustevnum, við misjøvnum úrslitum. Men hesaferð er líkt til, at tað fer at ganga heilt væl.

Fyrireikararnir vita sjálvsagt ikki hvussu mong vitjandi fara at koma til stevnuna, men teir vita, at ítróttarhøllin í Runavík er á tremur við framsýnarum og vørum. Áhuga at verða við á stevnuni hevur verið rættuliga stórur. Og tað sæst eisini aftur í høllini. Alt plássið í høllini er útnyttað til fulnar, til tess at fáa pláss fyri øllum. Tá hava fyrireikararnir enntá avgjørt, at allir persón- og lastbilar, sum skulu sýnast fram, skulu standa uttanfyri høllina.

Út frá stóru undirtøkuni ímillum handlarnar og fyritøkurnar í landinum, eru fyritreytirnar fyri eini góðari og fjølbroyttari sølustevnuni til staðar. Tí vænta - og vóna - fyrireikararnir, at áhugin at vitjað stevnuna verður rættuliga stórur.

Tað verða allar hugsandi vørur og tænastur at finna á sølustevnuni Marko ´2000 í Runavík - bæði stórt sum smátt. 30 framsýnarar eru við á stevnuni, og teir fáast við so fjølbroyttar vørur sum innbúgv, gávulutir, fløgur, bilar, fiskiamboð, bátaframleiðslu, piercing og mangt mangt annað. So til øll tykkum, sum dáma at ganga í handlum - antin fyri at keypa, ella bert fyri at hyggja - so er sølustevnan Marko ´2000 júst rætta staðið at fara. Annars eru allar hugsandi vørur og fyritøkur við, og fólk hava trygd fyri, at tað verður nóg mikið at hyggja eftir allar dagarnar. Umframt sjálvar sýningarnar á básunum er eisini nógv gott og fjølbroytt undirhald á pallinum leygar- og sunnudagin.

Stevnan letur upp fríggjadagin kl. 17.00, og er hon opin til kl. 22.00.

Leygardagin letur sølustevnan upp kl. 14.00, og kl. 15.00 setur Jákup Lamhauge, býráðsformaður, stevnuna. Hesar báðar seinnu dagarnar er undirhald á pallinum hvønn heilan tíma frá kl. 16.00. Leygardagin er mótasýning kl. 16.00. Kl. 17.00 undirheldur trubadururin á munnharpu og gittara, Sámal Ravnsfjall. Kl. 18.00 syngur og spælir Magni Christiansen country- og gospeltónleik á pallinum. Kl. 19.00 syngur Eivør Pálsdóttir sangir av komandi fløgu síni, sum helst kemur út seinni í ár. Kl. 20.00 er aftur stór mótasýning á pallinum, har luttakandi handlarnir og fyritøkurnar sýna fram nýggjasta mótan. Seinasta tiltakið á pallinum leygarkvøldið verður kl. 21.50, tá drigið verður millum seldu atgongumerkini fríggja- og leygardagin. Vinningarnar hava luttakandi handlarnir og fyritøkurnar latið. Sølustevnan letur aftur kl. 22.00

Sunnudagin letur sølustevnan upp kl. 15.00. Kl. 16.00 er mótasýning er á pallinum. Kl. 17.00 er vísusangarin Niels Midjord Live á pallinum. Kl. 18.00 vitja vísumenn úr Klaksvík, við m.ø. Hans Hjalta Skaale, sum flestu av okkum kenna frá beinraknu tættunum í Útvarp Føroya. Kl. 19.00 syngja og spæla Rúna á Heygum og Ronnie Nielsen. Kl. 20.00 er stór gallamótasýningi. Magni Poulsen á Skipanesi er frásøgumaður til mótasýningarnar allar dagarnar. Umleið kl. 21.50 verður drigið millum seld atgongumerki sunnudagin, og seldu atgongumerkini fyri allar dagarnar. Høvuðsvinningurin er ein ferð til Sveits við 12. Manni til landsdystin ímillum Sveits-Føroyar 7. oktobur. Sølustevnan Marko ´2000 letur aftur kl. 22.00, tá formaðurin hjá NSÍ endar stevnuna.

# Leggja ikki upp fyri lønarhækkan

*Fíggjarlógaruppskotið fyri 2001 leggur ikki upp fyri, at lønarsamráðingar aftur verða í vár*

John Johannessen

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur bert tikið hædd fyri avtalaða lønarvøkstrinum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001.

Hetta hevur hann gjørt, tí hann ikki heldur tað vera neyðugt at taka fyrilit fyri, at lønarsamráðingar verða aftur í vár.

– Tóku vit í fíggjarlógaruppskotinum fyilit fyri einum lønarvøkstri á til dømis 5 prosent, høvdu fakfeløgini fatað hetta soleiðis, at vit høvdu játtað teimum lønarhækkan, og tað ber ikki til, sigur Karsten Hansen.

Tískil kann staðfestast, at neyðugt verður við eini eykajáttan, um tað eydnast hjá til dømis Starvsmannafelagnum at samráða seg til at fáa lønina hækkaða.

Ein annar møguleiki er, at landsstýrið bjóðar fakfeløgunum skattalætta. Men hetta tóktist Karsten Hansen, landsstýrismaður, ikki vera serliga heitur fyri á tíðindafundinum í sambandi við, at fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram fríggjadagin.

– Ein skattalætti kann føra til, at samfelagshjólini fara at mala ov skjótt, vísti Karsten Hansen á.

Tískil bendir nakað á, at tað ikki fer at vera lætt hjá Fólkaflokkinum at fáa ígjøgnum uppskotið um skattalætta, sum flokkurin legði fram fyri stuttum.

*Fíggjarlógin 2000:*

# Hálv milliard í avlopi

*Fyrrapartin í gjár legði Karsten Hansen fíggjarlógina fyri 2001 fyri tingið og ætlanin er, at knøpp hálv milliard skal leypa av, tá árið er av. Hetta er á leið tað sama, sum verður mett at leypa av, tá árið í ár er liðugt*

Sveinur Tróndarson

Fíggjarlógin fyri 2001 er nú komin á tingborð.

Í gjár legði Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, fíggjarlógina fyri løgtingið til viðgerar, og tað eru ikki hissini tøl, sum tingið og nevndir tess, sleppa at viðgera.

Fíggjarlógaruppskotið javnvigar við góðum 481 mió. í avlopi, og er tað umleið tíggju prosent hægri enn væntaða avlopið fyri árið í ár verður.

## Meira inn í skatti

Sum høvuðsregla kann sigast, at alt hækkar á hesi fíggjarlógini. Samstundis, sum væntaða avlopið hækkar, hækka bæði útreiðslur og inntøkur.

Tað sigur seg sjálvt, at tá væntaða avlopið verður størri, so hækka inntøkurnar meira enn útreiðslurnar gera, og tað er eisini tað, sum sæst aftur í viðmerkingunum.

Á inntøkusíðuni hækka bæði skattir, avgjøld og ríkisveiting. Ríkisveitingin hækkar sambært avtaluni, sum gjørd var í 1998, og næsta ár eru 993 mió. ella knøpp milliard settar á fíggjarlógina.

Skattainntøkurnar í ár eru væl hægri enn væntað varð frammanundan og tað er við støði í hesari meirinntøku, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum væntar, at tað koma góðar 105 milliónir meira í landskassan í skatti, enn mett er fyri 2000.

Her skal so leggjast afturat, at framrokningar, sum Fíggjarmálastýrið hevur gjørt vísa, at skattainntøkurnar í ár vera 1.190 mió. krónur og ikki 1.015, sum mett var tá fíggjarlógin var gjørd. Á henda hátt, verður hækkingin bert trý prosent.

Viðvíkjandi mvg-inntøkunum er støðan tann sama. Higartil í ár, er nógv meira goldið landskassanum í mvg enn mett var frammanundan, og tað er við støði í hesum, at landsstýrismaðurin og embætisfólk hansara vænta, at mvg-inntøkurnar gerast 825 mió. krónur komandi ár.

## Størri útreiðslur

Samstundis, sum inntøkurnar hækka við 200 milliónum krónum, so hækka eisini útreiðslurnar. Tær hækkað við góðum 168 milliónum krónum, og tær útreiðsluhækkingarnar stava serliga frá hækking á fýra konti.

Heilsumál fáa góðar 50 milliónir meir. Almannamál fáa knappar 65 milliónir meir. Samferðsla og samskifti fáa góðar 30 milliónir meir, og tað vera uml. 50 milliónir meira til útbúgving og gransking enn játtað er í ár. Hinvegin eru næstan 60 milliónir minni til fiskivinnuna enn játtanin fyri í ár vísir.

Størsti vøksturin á almannaøkinum viðvíkir pensjóns- og forsorgarøkinum, sum hava fingið væk meira í sín part. Hetta samsvarar eisini sera væl við tann veruleika, at tað hevur verið trupult at halda játtanina í ár. Tingið viðgerð júst nú eitt mál um eykajáttan júst til Almanna- og heilsumálastýrið og tí sær tað út til at tað er tørvur á eini størri játtan.

Avleiðingin av fíggjarlógaruppskotinum er, at landskassin fær eitt styrkt gjaldføri. Góðar 134 milliónir skulu gjaldast í avdráttum av landskassaskuld, men so eru enn 347 milliónir eftir.

# Suðurstreymoyar Javnaðarfelag 75 ár

25. september 1925 varð Suðursteymoyar Javnaðarfelag stovnað. Politiska stríðið tá sum nú hevur altíð verið og er neyðugt at viðgera. Og hjá tí politiska felag, sum tá tók seg upp í Føroyum, var aðalmálið at vinna ljóð fyri sosialistisku demokratisku hugsjónini, sum eftirhondini hevði vunnið fastatøkur í øllum evropeisku londunum við tí til fylgju, at demokratisku rættindini hjá fjøldini nú vórðu vird og stættarmunurin so líðandi fór at hoyra fortíðini til.

Í Føroyum høvdu røddir verið frammi so spakuliga um aldarskifitið fyri 100 árum síðani, og ungu framfýsnu kreftirnar í Havnini gjørdu serliga vart við seg. Og smátt um smátt fór hendan nýggja tíðin við sterkari krøvum um rættindi hjá tí minni menta at harna, tá Havnar Arbeiðsmannafelag varð stovnað í 1916.

Við stovnanini av Javnaðarfelagnum 25 september 1925 var nú tann fyrsta staðfestingin av nýggjum ráki í politiska virkseminum í Føroyum komin. Frammanundan høvdu vit Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin, og teir sóu rímiliga reytt, tá Javnaðarflokkurin í 1927 bjóðaði seg fram til løgtingsvalið árið eftir.

Síðani eru umbroytingarnar í samfelagnum vorðnar fleiri, og vit hava í dag framkomið samfelag við øllum møguleikum at byggja víðari eitt samfelag, sum kann gerast gott og sterkt, bara vit megna at leggja til rættis soleiðis, at tað verður solidariskur samleiki, sum er ráðandi og ikki samfelagið, har kapitalurin einsamallur hevur maktina og mergsýgur einstaku menniskjuna.

Søgan um felag okkara er drúgv og hevur nógv at vísa á, hvussu kvinnur og menn hava lagt til brots og vunnið fjøldini betri søðir og livilig kor.

Stovnarar felagsins vóru:

Morentius Viðstein,
hann var fyrsti formaður felagsins
Anton Andréasen,
skrivari
Frits Hansen, kassameistari
Georg Rubbeksen,
nevndarlimur
Johannes Hansen,
nevndarlimur
Poul Johs. Hansen
Johannes Krogh
Johannes Guttesen
Joen Chr. Andreassen

Tað kann vera lagt afturat, at teir, sum tá løgdu navn til í felagshøpi, vóru ofta undir somu korum, sum teir fyrstu allastaðni, tá javnaðarrørslan tekur seg upp.

Mótstøðan var ofta hørð og ónærislig, at menn fyri ikki at missa breyð valdu at taka seg burtur úr felagnum - og tað gekst meira enn so, at illa gekst og striltið at fáa stillarar til lista.



*Morentius Viðstein var fyrsti formaður felagsins. Hann varð eisini valdur á ting fyri Javnaðarflokkin í 1928*

Hetta er søga í dag, vilja vit siga, men ein farri av hesum lyndi mundi vera tað, sum stakk hógvarnar fram í løgtinginum, tá mentamálaráðharrin, Tórbjørn Jacobsen, skírdi javnaðarfólk at vera letingar, og tá formaður tingsins ikki so frægt sum talaði at.

Á 75 ára degnum stendur Suðurstreymoyar Javnaðarfelag mitt í eini støðu, sum á ymiskan hátt minnir um tíðirnar bæði í byrjanini og tíðini aftan á heimskríggið, tá Javnaðarflokkurin var tað miðsøkjandi og skapandi, soleiðis at vit fingu eina samfelagsskipan, sum hevur vart okkum sum tjóð, sum fólk og sum framburðsríkt samfelag.

**25. september 2000**
**Jákup Lindenskov**






Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Klárur at syngja

*Millum spentu vágbingarnar, sum í dag leita sær niðan í Gundadal, er Robert McBirnie, sum bæði hevur sungið baberara og vunnið steyp til felagið í heimbygdini*



*- Eg eri rættuliga ivasamur undan dystinum. Ikki tí, liðið er gott, men avrikini hava ikki alla tíðina veri nóg støðug, heldur Robert McBirnie, sum sjálvandi vónar, at VB vinnur dystin og harvið FM-heitið*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

Síðani seinna kappingarhálva í fótbóltinum byrjaði, hevur serliga vágsorðið, Baberara, ofta verið havt á lofti. »Nú syngja vágbingar baberara« og syng nú baberara« hava verið millum yvirskriftirnar, og einki er ivast í, at vágbingar hava vónir um, at hesar yvirskriftir halda fram komandi vikuna.

Er tað nakar vágbingur, sum meira enn nakar annar hevur verið við til at skapt hugtakið, so má tað vera stór entertainarin úr Vági, Robert McBirnie. Millum frítíðarítriv hansara er nevnliga sangur, og ikki minst man sangurin um heimbygdina, ella babera-sangurin vera væl kendur millum manna.

Men hvat merkir baberara, og hví valdu teir at nýta júst hetta í sínum sangi.

- Sum mær er sagt, so skuldi hetta verið íkomið, einaferð dansur var á Tvøroyri. Onkur vágbingur hevði kanska fingið dekan ov nógv inn um, og tá skuldi so onkur tværámaður havt rópt eftir honum »syng nú baberara«. Hví tað so júst varð hetta, sum vit tóku við í sanginum, veit eg ikki. So at siga allir amerikanskir sangir høvdu tá í tíðini okkurt slag av Juhu kórið aftan fyri. Eg veit ikki um vit vóru teir fyrstu, sum nýttu hetta, men vanligt var tað so ikki í Føroyum.

## Fær ikki farið suður

Spurdur, hvørt hann eisini ætlar sær at syngja væl kenda lagið leygarkvøldið, svarar Robert, at hann tíverri hevur lovað seg út aðrastaðni.

Leygarkvøldið skal hann á pallin í Kagganum, men hann vísur tó á, at møguliga verður tikið í onkran vágssang, um orsøk er til tess.

Orsøkin er sjálvsagt, um tað eydnast VB at vinna fyrsta meistraheitið felagsins í fremstu mansdeildini. Robert hevur øll tey seinnu árini fylgt sera væl við, hvussu mansliðið hevur staðið seg. Undan hesum hevur hann eisini verið ógvuliga virkin í felagnum, bæði sum leikari, venjari og nevndarlimur.

Robert greiðir frá um hetta, at hann í fleiri ár var partur av einum sera góðum VB-liðið.

- Eg flutti suður aftur í 1969, og tá var VB júst komið upp í fremstu deildina. Eg haldi, at vit høvdu eitt sera gott lið, og besta úrslitið okkara mundi vera steypasigurin í 1974.

- Sum frá leið viknaði liðið tó nakað, og størsta orsøkin til hetta mundi vera fráflyting. Eg minnist t.d. eitt árið miðskeiðis í 70'unum, tá fimm av leikarum okkara búðu í Havn, og venjingarumstøðurnar verða sjálvsagt ikki meira enn næstbestar, tá so er.

Hetta hevur eisini verið ein trupulleiki hjá VB í nógv ár. Um fólkið verður í oynni, veldst í stóran mun um, hvussu nógv arbeiðspláss eru, so tað er einki løgið í, at VB hevur verið millum ídnastu feløgini at fáa útlendingar til landið.

## Trívast væl

Júst útlendingarnir eru aftur í ár ein týðandi partur av VB-liðnum, og einki er at ivast í, at Robert eins og nógvir aðrir vágbingar, er sera fegin um hetta.

- Eg haldi eisini, at teir útlendsku leikarar, sum hava verið í VB, hava trivist sera væl har suðuri.

- Tað sigur helst eitt sindur um vágbingar, men ein partur av frágreiðingini til hetta er helst, at teir eisini hava sínar uppgávur í felagnum. Teir taka sær av venjingini hjá yngru deildunum, og hetta viðførir eisini, at teir ungu hjá okkum verða eggjaðir til at leggja meira fyri, eins og leikararnir sjálvir verða betri við felagið, tá teir eru so nær knýttir.

- Annars kann eisini leggjast afturat, at tað eisini eru fleiri sera evnaríkir ungir leikarar ávegis. Onkur teirra er longu um at koma inn á besta liðið, og at fleiri koma tað í framtíðini, er einki at ivast í heldur Robert.

## Spentur um dystin

Í dag kann ein kanska siga, at starvstíðin hjá Robert í VB er farin, men hetta hevur tó á ongan hátt minkað um hug hansara at fylgja við fótbóltinum.

- Hóast eg búgvi í Havn, so eri eg framvegis vágbingur, og tað fari eg helst altíð at verða. Hetta ger seg sjálvandi eisini galdandi í fótbólti. Eg havi eisini spælt við B36, og vanliga haldi eg við teimum, tá teir spæla í Gundadali, men tá VB er hitt liðið, er eingin ivi.

Robert telist tó ikki millum teirra, sum rokna við, at VB fer at fáa nakað sum helst forerandi í dag.

- Eg rokni so avgjørt ikki við, at B36 ikki ætlar sær at vinna dystin. sigur hann sannførdur. Tað rokni eg ikki við, at nakað seriøst lið kundi funnið upp á, og heldur ikki haldi, at vágbingar eru áhugaðir í at fáa FM heitið til gávus.

- Eg eri eisini rættuliga ivasamur undan dystinum. Ikki tí, liðið er gott, men avrikini hava ikki alla tíðina veri nóg støðug. Eftir dystin í Runavík, har VB varð smurt av, legði eg allar FM-dreymar á hillina, men síðani hevur tað bara gingið framá.

- Sjálvandi vóni og ynski eg, at VB fer at gerast føroyameistari í ár, men eg tori ikki rættuliga at trúgva tí enn.

Spurdur, hvørt hann ætlar sær at gera nakað serligt burtur úr leygardegnum, svarar Robert, at tað hevur hann als ikki hugsað nakað serligt um.

- Satt at siga, so havi eg ikki lagt nakrar sum helst ætlanir, men tað er so púrasta vist, at eg fari á plenuna.

HYGG HER
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
JEEP TILBOÐ
Galloper 2,5 TD, 7 sitipláss
Km. 38.000 • Árg. 04/1999
kr. 215.000,-
SUPER 4x4 TILBOÐ
Mitsubishi L 300 vørubilur
Km. 90.500 • Árg. 08/1998
kr. 119.000,- v/ MVG
VIKUTILBOÐ
Lítil bilur
Árg. 10/1991
EINANS kr. 30.000,-
Sosialurin - 311820
OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!
AVHEINTINGAR-TILBOÐ
Daihatsu Charade Árg. des. 1991
koyrt 170.000 km. • Einans kr. 19.000,-
Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866